# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Uppiborin viðurkenning til nútímans fyritøku

Ikki óvæntað gjørdist byggifyritøkan P/f Articon Ársins virki 2008. Í grundgevingini fyri at velja P/F Articon sum Ársins virki 2008 vísir dómsnevndin millum annað á, at tað í dagsins samfelag eru starvsfólkini í fyritøkuni, sum bera fyritøkuna. Tað eru starvfólkini, sum við vitan og útbúgving, førleikum og vilja at veita marknaðinum tað, hann biður um, skapa ta álit á fyritøkuni, ið ber langt inn í versnandi tíðir. Víðari verður nevnt, at hvør kundi verður mettur sum nýggjur, sjálvt gamal samstarvsfelagi, og hvør uppgáva er nýggj, sjálvt um hon líkist henni, ið varð greidd í gjár. Dagurin í dag krevur nýggjar og rætt tillagaðar loysnir og fólk duga sjálvi at taka røttu avgerðirnar, kennast tey við málini, og best duga tey í eggjandi samstarvi. Hetta er ein beinrakin lýsing av tí ættarliðið, sum í dag myndar nógvar almennar og privatar fyritøkur og stovnar.

Dómsnevndin staðfestir, at alt fleiri fyritøkur í Føroyum skipa seg eftir nútímans meginreglum í og við, at tær leggja dent á fjøltáttaða útbúgving og endurútbúgving av starvsfólki. Hesi starvsfólk loysa uppgávurnar í toymum, har dygd, trygd og trivnaður verða sett í hásæti. Tað ber sostatt til at staðfesta, at fyritøkur, ið ásanna, at hesar eru fyritreytirnar fyri góðum kappingarføri og vøkstri, gerast vinnarfyritøkur. Tað, sum dómsnevndin sigur við hesum er, at fortreytirnar fyri at ein fyritøka kann mennast og geva avkast til ánararnar, er ein nútímans starvsfólkapolitikkur, har útbúgving, trivnaður og nútímans leiðsluførleikar eru sjálvt støðið undir fyritøkuni. Tað er m.a. hetta, ið ger eina føroyska fyritøku føra fyri at takla altjóðagerðina.

Vit hava tíbetur slíkar fyritøkur í Føroyum og dómsnevndin hevur so valt eina av hesum fyritøkum til Ársins virki 2008. Articon hevur eftir fáum árum við denti á dygd, trygd, trivnað og starvsfólkamenning megnað at gerast ein tann størsta fyritøkan í sínari vinnu í Føroyum. Articon hevur staðið seg væl í kapping og samstarvi við stóru útlendsku kappingarneytarnar. Altjóðagerðin setir nýggj og sera stór krøv til føroyskar vinnufyritøkur uttan mun til, hvørjum øki hesar fyritøkur virka á. Tann fyritøka, sum ásannar hetta og tískil hevur greið mál og strategiir til tess at takla hesa støðu, sum veruliga er nýggj fyri føroyskar fyritøkur, gerst ein vinnarafyritøka. Articon er júst ein slík fyritøka, sum eftir bert stutta tíð hevur vunnið sær stóra virðing sum eitt virki, ið framúr væl megnar og dugir at møta teimum stóru og nýggju krøvum, sum altjóðagerð og globalisering bera við sær. Viðurkenningin er væl uppiborin og vit ynskja P/Farticon til lukku og góðan byr í framtíðini.

**Sosialurin**

## Skúlin við Løgmannabreyt ein deyðsfella

**HØGNI MIKKELSEN**



Nú eru nakrar vikur síðani, at skúlin við løgmannabreyt lat upp fyri skúlabørnum. Foreldur kunnu ikki føla seg trygg at lata børnini fara til gongu í skúla, tí ferðslutrygdin er ikki nøktandi.

Undirritaði hevur gjørt vart við ferðslutrupuleikan til umsitingina og til forkvinnuna í teknisku nevnd, men tað hendir alt ov lítið. Kommunan hevur sagt, at tað skulu vera skúlatryggir vegir, men tað kann ein ikki siga, at tað er við nevnda skúla. Tað er ov vánaligt.

Tá skúlin byrjaði varð onki gjørt fyri trygdina hjá børnunum, og tað er alt annað enn gott. Undirritaði ringdi til kommununa og spurdi, hví gonguteigarnir og bungur ikki vóru gjørdar. Nakað eftir vóru gonguteigarnir gjørdir, og so hendi ikki meir.

Undirritaði sendi síðani teldupost til limirnar í teknisku nevnd og fólk í umsitingini, sum hava við hesi arbeiði at gera, og tá blivu nakrar strikur gjørdar á gonguteigarnar, og síðani er onki meira hent.

Tað eru ár síðani, at kommunan visti, at ein skúli skuldi byggjast við Løgmannabreyt, so kommunan kann ikki siga, at tað er nakað nýtt, at skúlin er komin.

Ætlaði ikki at fara í bløðini um hetta málið, men eg kann ikki lata vera, tí um tað er tað, sum skal til fyri at arbeiðið skal gerast liðugt, áðrenn ein ólukka hendir, so geri eg tað gleðiliga.

## Haldi at Uni Arge fer skeivur

**JÓGVAN VIÐ KELDU**



Átrúnaður sum heild í Føroyum hevur ikki seinastu øldina bert ligið og lúrt og bíðað eftir betri líkindum fyri veruligari framrættaðari menning, hevur heldur ikki verið ræddur fyri nýggjari vitan og broytingum! - Tvørturímóti

Í vikuni hevði eg viðmerking til grein hjá Una Arge í Dimmalætting 18. september: "Føroyar í politiskum kyksendi" viðvíkjandi broti hansara um "fiskivinnuna sum gevur hall". – Her grundgav eg fyri, hví eg var og eri ósamdur.

Annað brot í grein hansara, sum eg lovaði at venda aftur til, har hann samantvinnar "átrúnað, sum hann skuldsetur fyri menatala stagnatión í Føroyum", eri eg heldur ikki samdur við honum.

Hann sigur: "Átrúðnaður hevur fastatøkur á mongum fólkum í landinum, og tað er sjálvandi ein privat sak, sum ongin skal blandað seg uppí. Men við absoluttum og endaligum meiningum um lív, samfelag og himmal tykjast mong at hava trupult við at góðtaka nýggja vitan og broytingar. Úrslitið er mental stagnatión".

Sum eisini nevnt í fyrru grein míni um fiskivinnuna, so er hetta uppáhald ikki nøkur nýggj ákæra, hon er einsíðug, tí hetta kann ikki av røttum sigast so einfalt.

**Møguliga vónsvikin**

Lat meg fyrst siga, at eg eri púra samdur við Una í, at nýhugsan, veruligar hugsjónir og visjónir (ikki droymarí) og framtakshugur er tað Føroyar, eins og øll onnur lond, hava brúk fyri undir eini mennandi framtíð. Hetta er grundarlagið fyri menning, men vit skulu vita, at hesin vegur er tungur, langur og krevjandi at ganga bæði fíggjarliga og sanniliga visionert. Tað vita øll, ið hava gingið og koma at ganga hann!

Skilji eisini væl Una, sum bæði er evnaríkur og í góðum árum, at hann helst kennir seg vónsviknan av samfelagnum, sum hann væntaði meir av: Eingin Silicon Valley, sjálvstýri er skotið langt út, føroyska granskingarvinnan gongur seint, (politikarar verða skuldsettir) vitanarvinnan, hóast hon mennist, ofta er eftirbátur sammett við okkara grannatjóðir.

Sá nú ein dagin, at danir helst fóru at flyta síni oljugranskingarøki til Houston í Texas - sjálvandi til USA - tí tørført er at finna kvalifiserað fólk í Danmark.

**Niðurbrótandi fordómur**

Sjálvur haldi eg ikki, at átrúnaður í Føroyum seinastu øldina bert hevur ligið og lúrt og bíða eftir betri líkindum. Heldur hinvegin, hevur hann skapt sjálvbjargni, sett nøkur mørk (sum kanska onkur heldur eru í so strong), ikki vanliga verið ræddur fyri at góðtikið nýggja vitan og broytingar, men hevur heldur verið víð í teimum og skapt tey.

Hetta er fordómur, sum alt ov sjáldan hevur verið vístur aftur, tá álopini komu. At hesi álop hoyra til í gerandisdegnum, er so nakað heilt annað.

Sjálvandi hevur menniskjaliga uppalingarøkið og -umhvørvið heilt náturliga nógv at siga, bæði fyri og ímóti hesum fordómum. Vit ávirkast øll sjálvsagt av okkara menniskjaliga umhvørvi. At onkur fer longri enn annar, er einki ónatúrligt í frælsum landi, serliga nú tolsemið er í hásæti. Hetta hendir í øllum londum.

Haldi sjálvur Uni, at í hesum førum fert tú skeivur, hetta er ov grunt og einsíðugt, men sjálvandi er óneyðugt hjá mær at brúka fyribrigdi um "dunnuhylin", sum kanska er í so nógv brúkt og verður kanska eitt sindur "subjektiviserað".

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.